LM-042/2020

Guðrið Dam Andreasen

Fra: Guðrið Dam Andreasen
Sendt: 22. september 2020 15:27
Til: Guðrið Dam Andreasen
Emne: VS: Svarskriv til Uppskot til broyting í kapittul 12, 13 og 20-23 í revsilógini ið er sent til ummælis
Vedhæftede filer: Javntekstur til broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin) (Kap12 13 og 20-23).docx

Fra: Andras Marr Poulsen <Andras.Poulsen@fisk.fo>
Sendt: 28. januar 2020 13:18
Til: Gudrun Mortansdóttir Nolsøe <gudrunnolsoe@tinganes.fo>
Emne: Svarskriv til Uppskot til broyting í kapittul 12, 13 og 20-23 í revsilógini ið er sent til ummælis

Til lógardeildina á Løgmansskrivstovuna

Torkil V. Rasmussen og Andras Marr Poulsen hava tann 21, januar 2020 vegna Fiskimálaráðið hugt at broytingunum ið vórðu sendar Fiskimálaráðnum til hoyringar.

Niðurstøðan var at tað er ov arbeiðskrevjandi at gera viðmerkingar til allar lógargreinarnar, tí verður sent eitt yvirskipað svar – sí niðanfyri.

Vísandi til umbøn um hoyring í sambandi við føroyska týðing av galdandi revsilóg skal viðmerkjast, at tilbúgvingarøkið er skipað í serlóggávu.

Mett verður ikki, at ein týðing av revsilógini hevur nakra beinleiðis og týðandi ávirkan á tilbúgvingarøkið.

Tað verður eisini ov arbeiðskrevjandi at gera viðmerkingar til allar lógargreinirnar í umbidnu kapittlunum, men tó hevur Fiskimálaráðið loyvt sær at gjørt nakrar almennar viðmerkingar til §§ 180-182.

Fiskimálaráðið mælir til, at tryggjað verður, at føroyska týðingin fær júst sama innihaldsliga týdning sum autonom revsirættarlig hugtøk í donsku lógini. Eisini er týðandi, at orðingar eru greiðar, tí talan er um revsirætt, og sambært EMRS, art. 7 verður kravt, at heimild at revsa er ásett í greiðari revsireglu.

Hetta seinasta er munandi meiri týdningarmikið, enn at orð og hugtøk eru málsliga sambærilig við føroyskar málfrøðiligar týðingar, ið ofta ikki hava ta heilt stóru løgfrøðiligu tilvitskuna.

Vinarliga / Kind regards

Andras Marr Poulsen
Tilbúgvingarsamskipari / Emergency Management Coordinator

Fiskimálaráðið / Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 55 32 70 • Fax (+298) 35 30 35 • andras.poulsen@fisk.fo • www.fisk.fo

Stk. 3. Med samme straf anses endvidere den, der i den i stk. 1 nævnte hensigt og under anvendelse af de dér nævnte midler begår den i § 193 omhandlede forbrydelse eller lignende almenskadelig handling. **§ 118 a.** De i §§ 111-115 og 118 omhandlede forbrydelser er i alle tilfælde genstand for offentlig påtale, der sker efter justitsministerens påbud. **§ 118 b.** (Strikað).	*Stk. 3.* Somu revsing fær eisini tann, sum við tí endamáli og tí framferðarhátti, sum nevnd eru í stk. 1, fremur tað brotsverk, sum umrøtt er í § 193, ella aðra alvandasama gerð. **§ 118 a.** Brotsverkini, sum nevnd eru í §§ 111-115 og 118, verða altíð lógsøkt við almennari átalu eftir boðum frá løgmálaráðharranum. **§ 118 b.** Á sama hátt verður tann revsaður, sum fremur tær í §§ 111-116, nevndu gerðir mótvegis danska statinum ella mynduleikum tess."
20de kapitel. **Almenfarlige forbrydelser.** **§ 180.** Sætter nogen ild til egen eller fremmed ejendom under sådanne omstændigheder, at han indser, at andres liv derved udsættes for overhængende fare, eller det sker med forsæt til at volde omfattende ødelæggelse af fremmed ejendom eller til at befordre oprør, plyndring eller anden sådan forstyrrelse af samfundsordenen, straffes han med fængsel indtil på livstid. **§ 181.** Forvolder nogen ellers ildebrand på fremmed ejendom, straffes han med fængsel indtil 6 år. *Stk. 2.* På samme måde straffes den, der med forsæt til at besvige brandforsikringen eller krænke panthaveres rettigheder eller med lignende retsstridigt forsæt forvolder ildebrand på egen ejendom eller på andens ejendom med ejerens samtykke. *Stk. 3.* Straffen kan stige til fængsel i 10 år, hvis der foreligger særligt skærpende omstændigheder. **§ 182.** Den, som af uagtsomhed forvolder ildsvåde på fremmed ejendom eller til skade for fremmed formueinteresse, straffes med bøde eller fængsel indtil 2 år.	4. Kapittul 20 verður orðaður soleiðis: **"Kapittul 20** **Alvandasom brotsverk** **§ 180.** Setir onkur eld á egna ella annans ogn undir slíkum umstøðum, at hann skilur, at hann harvið setir lívið hjá øðrum í stóran vanda, ella hann ger tað við tilætlan um at gera umfatandi skaða á annans ogn ella til at gera uppreistur, rán ella aðra slíka órógv á samfelagsskipanina, verður hann revsaður við fongsli í upp til lívstíð. **§ 181.** Tann, sum annars elvir til eldsbruna á annans ogn, verður revsaður við fongsli í upp til 6 ár. *Stk. 2.* Somu revsing fær tann, sum við tilætlan um at snýta brunatryggingina ella at gera seg inn á rættindi hjá veðhava, ella sum við líknandi løgleysari tilætlan elvir til eldsbruna á egna ogn ella á annans ogn við samtykki eigarans. *Stk. 3.* Revsingin kann vaksa til fongsul í upp til 10 ár, um talan er um serliga skerpandi umstøður. **§ 182.** Tann, sum av ósketni elvir til eldsbruna á annans ogn ella ger skaða á annans ognaráhugamál, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 2 ár.

Kommenterede [AMP1]: Overhængende fare er ikki neyvtúrviliga tað sama sum at seta í stóran vanda. Smb. Revsilógarinnar § 13 og viðmerking 91 til greinina í talgilda lógarsavninum hjá Karnov: Kræver, at angrebet sker i rimelig nær kontinuation. Mod forbrydelser med fremrykket fuldbyrdelsesmoment og ved vedvarende forbrydelser, skan der udøves nødværge, indtil den kriminelle virksomhed er afsluttet.

Kommenterede [AMP2]: Tilætlað ger

Kommenterede [AMP3]: fremja

Kommenterede [AMP4]: Kann misskiljast og skal ikki samantvinnanst við rán sb. Revsilógarinnar § 288. Plyndring er ikki røveri

Kommenterede [AMP5]: Á sama hátt, verður tann revsaður sum tilætlað..

Kommenterede [AMP6]: Svikja – hugtakið hevur ein autonoman týdning, eisini í avtalurættarligum høpi. Snýta kann tykjast ov bagetaktigt, meðan at svikja er meira kvalifiserað snýt.

Kommenterede [AMP7]: Virkar fløkjasligt og tað eigur onkursvegna at orðast greiðari soleiðis at tað er greitt, at greinin snýr seg um tilætlað at gera fíggjarligan skaða á rættindini hjá veðhavara.

Kommenterede [AMP8]: Ildsvåde er ikki tað sama sum eldsbrunl í tryggjarrættarligum og revsirættarligum týdningi. Talan er nokk heldur um vandan fyri eldsbruna. Våde merkir váði ella vandi fyri.